## Laksa- og sølutorg í Runavík

Annan leygardag – 19. juli – verður aftur Laksa- og sølutorg í Runavík. Eins og undanfarin ár verður nógv spennandi at vitja á Laksa- og Sølutorginum allan dagin, bæði fyri børn og vaksin. Málningaframsýning er í Býráðssalinum v/Harry Knudsen og Jastrid Langgaard. Á Torginum eru fittar geitir við geitalombum at síggja umframt at børnini vera boðini við á tí spennandi og sera vælumtóktu Ævintýraferðina hjá Búa Sibbidibbidi mdimdubadabaDam og Dánjal Kagadingdingkagadingdingkagadum. Nógvur góður fólkatónleikur frá Fólkatónleikastevnuni verður at hoyra og harafturat sera leskiligt, flott laksaborð við ókeypis smakkiroyndum til øll vitjandi.



## Nýggj rødd á Summar Festivalin

Anna Nygaard av Glyvrum var í ár ein tryggur vinnari av Ársins songrødd. 16 ára gamla songkvinnan sang so sannførandi ein sang hjá Aretha Franklin, at hon streyk avstað við sigrinum í kappingini. Nógvar stórar songkvinnur hava fingið sín elddóp í Ársins songrødd, og líkt er til, at ein nýggj kvinnulig songstjørna er á veg. Ein av vinningunum í Ársins songrødd var møguleikin at spæla á Summar Festivalinum, og hesum møguleika tekur Anna Nygaard av. Hon fer at spæla saman við bólki sínum.

# Føroysk síða sum sýnisgluggi



*Tað er ikki bara á netinum, at stjórin á Businss-Line rør út. Men kanska kann netið eisini vera við til at fanga nýggjar fiskar*

**Talan er um stórt herðaklapp, sum eisini minnir okkum á, at finst ein marknaður uttan fyri Føroyar, sigur Finnur Sivertsen, stjóri á Business-line. Heimasíðan hjá fyritøkuni er hendan mánaðin vald sum case-study hjá Dynamic Web**

VINNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Vinnuportalurin hjá Business-line varð stovnaður í 2000 sum tann fyrsti av sínum slag í Føroyum.

Talan var fyrstu tíðina um ein portal, har tað fyrst og fremst bar til at leita upplýsingar um roknskapir formuligu viðurskiftini hjá parta- og smápartafeløgum í Føroyum, men síðani er tørvurin øktur. Og í fjør varð avgerð tikin um, at endurnýggja portalin frá botni av.

- Uppgávan snúi seg um at fáa hagtøl, tíðindi, forritan, sniðgeving við meira. at renna saman í eina hægri eind, og at fáa ein brúkaravinarligan vinnuportal burtur úr, sigur Finnur Sivertsen, sum øll árini hevur rikið heimasíðuna.

– Í sambandi við dagføringina í ár tóku vit upp samráðingar við Sendistovuna og partarnir komu til ta niðurstøðu, at best var at leggja nýggju síðuna yvir á eina nýggjan, meira framkomnan pall. Og her fall valið á Dynamic Web, ið eitt nú stóru føroysku bankarnir nýta.

– Talan er um eina krevjandi tekniska loysn, ið krevur nógv av forritarum. Sniðgevar fingu seg eisini roynd-ar, tí síðan skal verða løtt at nýta og samstundis síggja væl út. Vit settu stór krøv, men halda, at Sendistovan hevur megnað at loyst uppgávuna fyrimyndarliga, sigur Finnur Sivertsen.

### Útvaldir í juli mánaði

Og hesa áskoðan er hann altso ikki einsamallur um at hava. Sum vit skrivaðu fyrr í vikuni, so valdi framleiðarin sjálvur síðuna hjá Business Line sum "case-study" hendan mánaðin. Altso ein síða, ið kann vísa viðskiftafólkunum, hvørjar møguleikarnir eru við Dynamic Web. Og á heimasíðuni hjá Dynamic Web verða bæði Sendistovan og www.bl.fo róst til skýggja.

– At vit verða sæddir uttan fyri føroysku landoddarnar minnir okkum á, at tað finnist ein marknaður uttan fyri Føroyar. Og kanska er tað nakað, sum vit áttu at hugt eitt sindur nærri uppá, sigur Finnur Sivertsen, eigari og stjóri á Business-line.

Ummæli, sum Dynamic Web gevur síuni hjá Business Line, kann lesast á slóðini, *www.dynamicweb.dk/Featured-case-study-28565.aspx.*

### Nýggir møguleikar

Fleiri fyrimunir eru við nýggju síðuni hjá Business-line. Tú skalt framvegis hava hald, um tú skalt lesa roknskapir hjá fyritøkum, men nógvir aðrir upplýsingar eru tó atkomuligir hjá øllum. Eitt nú upplýsingar um nevnd, leiðslu og bústaðir.

Eisini hava øll parta- og smápartafeløgnú møguleika við egnum orðum at lýsa sína fyritøku á síðuni. Tað gevur feløgunum ein betri møguleika at kunna møgulig viðskiftafólk, og tað gevur eisini ein størri interaktivitet millum heimasíðuna og brúkaran.

# Føroysk gospel-diva á Summar Festivalin

**Føroyska songkvinnan Linda Andrews hevur sungið kór hjá óteljandi kendum sangarum, men hon dugir sanniliga eisini sum solistur, og á Summar Festivalinum fer hon at bjóða eina rimmar framførslu við góðum gospeltónleiki**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

**Carola, James Sampson, Johnny Logan, Soap, Blå Øjne, Guðrun Sólja, A-Teens og nógv fleiri hava havt gleðina av at hava Lindu Andrews sum kórsangara.**

**Føroyska songkvinnan, sum er búsitandi í Danmark, er ein nógv umbiðin kórsangari, og hon hevur framført til bæði Danish Music Awards og Grand Prix.**

**Sum solistur er Linda Andrews ein rættiliga gospel-diva. Hon er solistur til konsertir og tiltøk, og hon ferðast eisini runt í Danmark at hava workshop í gospelsangi.**

**Linda Andrews roynir seg nú eisini við einari fløguútgávu, sum kallast Revelation, og tá hon í august fer á pallin á Summar Festivalinum, verður tað við einum væl spælandi bólki í rygginum og frálíkum sangum á skránni.**

**Dømi um tónleikin hjá Lindu Andrews kunnu hoyrast á hennara myspace-síðu.**



*Fyri tað mesta hevur hon roynt seg sum kórsangara, men í Klaksvík fer Linda Andrews einsamøll á pallin*